Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya
Postboks 1376
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
(+298) 21 13 76
www.blf.fo
blf@blf.fo

*29. januar 2020*

# UMMÆLISSKRIV

***viðvíkjandi***

**uppskoti til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing (ALS-lógin)**
(Hækkan av arbeiðsloysisstuðli og eftirløn av arbeiðsloysisstuðli), og

**uppskoti til kunngerð um broyting í kunngerð um ALS-gjald**
(Lækkan av ALS-gjaldinum).

BLF takkar fyri høvið at gera viðmerkingar uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing, umframt uppskot til kunngerð um broyting í kunngerð um ALS-gjald.

Fyrst skal viðmerkjast, at Arbeiðsloysissipanin (ALS) er ein tryggingarskipan fyri tey, sum eru arbeiðsleys, og fyri tey, sum tryggja seg fíggjarliga ímóti arbeiðsloysi. Tørvur og áhugamál hjá teimum sum ALS skal tryggja, broytast við búskaparligu konjunkturunum øvugt av, hvussu búskaparkonjunkturarnir ávirka fíggjarligu umstøðurnar hjá ALS. Um tey sum varða av ALS áseta inngjaldið og serliga útgjaldið sambært galdandi fíggjarligu umstøðunum hjá ALS, kann tað ganga ímóti endamálinum við skipanini sjálvari.

Sambært viðmerkingunum til uppskotið tekur ALS-stýrið fyrivarni um at venda aftur við uppskoti um at hækka inngjøld og lækka útgjøld seinni, um arbeiðsloysið verður verandi høgt í longri tíð. Til hetta skal BLF viðmerkja, at betur hevði verið at gjørt fleiri og betri greiningar av haldførinum hjá skipanini, áðrenn broytingar verða gjørdar, sum kunnu ávirka haldførið til tað verra.

BLF tekur í útgangsstøði undir við, at útgjaldið – sum hevur verið tað sama síðan 2012 – verður hækkað. Hetta er tó við teimum fyrivarnum, at ongar greiningar eru gjørdar, og at hóast tað er gott fyri tey sum eru ella gerast arbeiðsleys, at útgjaldið verður hækkað, kann tað vera vandamikið at gera slíkar broytingar, um tað merkir, at útgjaldið lækkar aftur, tá arbeiðsloysið hækkar og fleiri fólk verða arbeiðsleys. Tá arbeiðsloysið hækkar er ikki rætta tíðin at lækka útgjaldið, men kanska júst tað øvugta.

Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya
Postboks 1376
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
(+298) 21 13 76
www.blf.fo
blf@blf.fo

BLF fegnast, um til ber at fíggja ALS við einum lægri inngjaldi. Kortini verður mælt til at vísa varsemi við broytingum, sum elva til at haldførið hjá skipanini versnar, áðrenn nøktandi greiningar eru gjørdar, so tryggjast kann at skipanin framhaldandi kann vera haldfør. Hetta er serliga týdningarmikið, tá útgjald verður hækkað og inngjald verður lækkað samstundis. Tað hevur stóran týdning at varðveita eina trygga arbeiðsloysisskipan, sum eisini er mótstøðufør, tá arbeiðsloysið aftur fer at hækka.

**Vinarliga**

**Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya**